# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## SEV útnevnt Finn til rakstrarleiðara

**Stýrið fyri SEV samtykti í dag at seta Finn Jakobsen, deildarstjóra fyri býtisvirkini, at røkja starvið sum rakstrarleiðari. Finn Jakobsen tekur við sum rakstrarleiðari, tá Elnevndin hevur góðkent setanina**

TÍÐINDASKRIV



Finn Jakobsen, deildarstjóri fyri býtisvirkini hjá SEV, fer nú umframt deildarstjórastarvið eisini at røkja starvið sum rakstrarleiðari í Elfelagnum. Hann tekur við, tá Elnevndin hevur góðkent setanina. Rakstrarleiðarin hevur ábyrgdina av trygdini í SEV, og at sterkstreymsreglugerðin verður hildin.

Klæmint Weihe, stjóri, hevur verið rakstrarleiðari, síðani hann tók við stjórastarvinum fyri skjótt 25 árum síðani, og undan honum røkti fyrrverandi stjórin, Hjalgrím Winther, hetta starv.

Tá stríðið tók seg upp um m.a. rakstrarleiðarastarvið í undanfarna stýri, og Klæmint Weihe varð sendur til hús, varð Jón Nielsen, kaðal- og linjumeistari, settur fyribils rakstrarleiðari. Hann er nú givin í hesum fyribils starvi, og Klæmint Weihe røkir tað, til Elnevndin hevur góðkent Finn Jakobsen.

Bæði sum rakstrarleiðari og sum deildarstjóri vísir Finn Jakobsen til stjóran, sum hevur tilvísing til stýrið. Undanfarna stýri mælti til, at rakstrarleiðarin skuldi vísa beinleiðis til stýrið. Men nýggja stýrið er av teirri áskoðan, at tað er ein greiðari bygnaður, at stjórin einsamallur vísir til stýrið.

Finn Jakobsen hevur starvast hjá SEV síðani 1. november 1997, og í 2004 tók hann við sum deildarstjóri fyri býtisvirkini. Hann er 38 ár og útbúgvin sterkstreymsverkfrøðingur.

Stýrið valdi á fundinum í dag eisini nýggjar nevndarlimir í SeWave og P/F Fjarhitafelagið. Poul Arni Jacobsen, næstformaður í stýrinum, og Jógvan Emil Nielsen, stýrislimur, eru valdir í nevndina í SeWave. Stýrislimirnir, Torleif Sigurðsson og Regin Olsen, eru valdir at umboða SEV í nevndini í P/F Fjarhitafelagnum.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sámal Petur Svartá, Saksun**, andaðist í heiminum sunnudagin 5. mars, 89 ára gomul. Kistan fer frá heiminum í dag kl. 17. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Sámal Petur, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu.

**Jóannes Stakkslíð, Tórshavn**, ættaður úr Tjørnuvík, andaðist fríggjadagin 3. mars 57 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrshúsinum í dag kl. 19. Jarðarferðin verður týsdagin 7. mars, kl. 13 úr Vesturkirkjuni. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, sum vilja minnast Jóannes, kunnu lata eina peningagávu; konta í Suðuroyar Sparikassa.

**Olaf Andreasen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 3. mars 81 ára gamal. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 7. mars kl. 19. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Olaf, kunnu lata eina gávu til Cystisk Fibrosufelagið, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Torbjørn Justinussen, Leirvík**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 7. mars kl. 16. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju mikudagin 8. mars kl. 14. Tey, ið vilja minnast Torbjørn, kunnu lata eina peningagavu; konta í Norðoyar Sparikassa.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í 1916



Konfirmantarnir 1. oktober 1916. Teir 9 dreingirnir aftast, f.v.: ókendur, ókendur, ókendur, Lars Peter Julian Hansen (Havn) ókendur, ókendur, Samuel Peter Martin Davidsen (Havn), ókendur og ókendur.

Teir 12 konfirmantarnir í miðjuni f.v.: Thomine Jacobsen (Nólsoy), Ragna Mohr (Havn), ókend, ókendur, ókendur, ókend, ókend, Jenny Karoline Marie Thomsen (Nólsoy), Johannes Martin Djurhuus (Havn), ókend, Mikkel Samuelsen (Havn) og ókendur.

Tær 6 genturnar fremst f.v.: ókend, Ragnhild Theodora Nikoline Susanne Mørkøre (Havn), ókend, ókend, ókend og ókend.

Teir konfirmantarnir ið ikki eru navngivnir á myndini eru: Ellen Kate Bærentsen, Anna Marie Oluffa Katrine Andreasen, Oluffa Helene Jakobine Jacobsen, Hanna Sigrid Jacobsen, Dagmar Frederikke Hansen, Thomas Steingrim Joensen, Johannes Frits Wejhe, Poul Müller, Sofus Hans Poulsen, Thorstein Arge, Poul Thorstein Joensen, Poul Olaf Emil Hansen, Sofus Holberg Jacobsen, Herluf Andreas Johansen, øll úr Havn. Síðani eru tað Alvilde Christine Eide (Nólsoy), Josefine Marie Petersen (Nólsoy), Johanne Malene Benedikte Kolbjørnsen (Hestur), Susanne Malene Danielsen (Nólsoy), Ole Christian Joensen (Argir), Joen Oliver Jacobsen (Nólsoy), Bærent Eivind Vang (Kaldbak) og Hans Edvard Hansen (Nólsoy).

Á myndini eru 13 gentur, og er tað talið á teimum, sum blivu fermdar. Dreingirnir eru 14 á myndini, meðan 17 blivu fermdir, tv.s. at 3 dreingir mangla á myndini.

Vit fara so inniliga at heita á lesararnar um at hjálpa okkum við at fáa røttu nøvnini á røttu persónarnar. Vinarliga ringið til Birgar Johannessen, tlf. 314647 ella 214647.

**Dagurin í morgin**

**7. mars. Perpetua**, deyð ár 202 ella 203. Trælkona í Kartago, sum saman við hábornari konu Felicitas varð tikin av døgum fyri trúar sakir.